Nr. 32/2020

Hervør Pálsdóttir
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um vardar bústaðir, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvør er orsøkin til, at bert ein vardur bústaður verður bygdur í Havn?
2. Hvørjar avleiðingar fer tað at fáa fyri bíðilistan?

Viðmerkingar:
Í 2018 samtykti eitt samt Løgting løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir, ið skuldu húsa 18 búfólkum hvør. Vardu bústaðirnir í Suðurstreymoy eru slitnir og í ringum standi.

Nú frættist í miðlunum, at landsstýrismaðurin ætlar at koma í tingið við uppskoti um at gera ein stovn, og ikki tveir, sum upprunaliga ætlanin var.

Bíðilistin til vardar bústaðir eru eisini øgiliga langur - 182 fólk eru á bíðilistanum - og tørvurin í Suðurstreymoy er serliga stórur. Summi hava enntá staðið á bíðilista í áratíggju.

Tað hevur stóran týdning, at bústaðir verða bygdir. Sum samfelag eiga vit at rúma øllum, og tí eiga vit at kunna tryggja teimum, ið hava brúk fyri tí, ein virðiligan bústað, har tey kunnu hava eitt virðiligt lív og tryggleika; ein bústað, sum gevur hóskandi karmar til privatlív og felagslív, og sum styðjar undir, at borgarin kann nýta sínar førleikar og gerast so sjálvbjargin, sum til ber.

At fáa útveitt fleiri vardar bústaðir, ið eru í góðum og tíðarhóskandi standi, hevur stóran týdning; serliga tá bíðilistin gerst longri og longri. Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 21. oktober 2020

Hervør Pálsdóttir